gult cyan magenta svart





Elsa Pállson í stuttum skjúrti – lárkort – í 1969



Sonni Smith millum Ásu Poulsen og Kristian á Neystabø



Hin litríki Jimi Hendrix í Electric Lady Land í 1968




Teir fýra villu í bólkinum The Who í 1966. Á húsanum sæst eisini Vakra búrmerkið hjá S. H. Jacobsen, har Sonne var krambakallur

til enn, ongantíð so góður sum nú.

Vit varnaðust tann amerikanska superbólkin Grand Funk Railroad, hvørs trummusláara, Don Brewer, fleiri føroyskir trummusláarar royndu at herma eftir, og vit hvukku við av yvirsuperbólkinum Led Zeppelin, hvørs Good Times Bad Times dundraði í mangari hampastovu.

Tað bar rætt og slætt ikki til at herma eftir øllum hesum superbólkum við góðari samvitsku. Men stuttligt og spennandi var tað. Tann einasti, ið dugdi so nøkulunda at skapa sær eftir einum broti úr Whole Lotta Love hjá Led Zeppelin, var Tønnis Wardum.

Allur hesin betongrokkurin, allar hesar kraftmiklu framførslurnar, hóskaðu stak væl til plátuspælararnar í diskotekunum, sum tóku seg upp síðst í trýssunum, ja, so seint sum í 1969. Tá varð Beat 69 stovnað. Ein roynd og eitt tiltak, sum veruliga setti gongd á í 1970, tá ið diskotekklubbin hjá Árna C fekk tey ungu at undrast í Havnar Klubba.

Hetta var ein ótrúlig tíð við tí, vit í dag kalla, øllum tí feitasta musikkinum, sum til var. Og alsamt fleiri útlendskir bólkar komu hendavegin at ríka okkum við øgiligum musikkupplivingum. Vit fingu Savage Rose og Burnin' Red Ivanhoe úr Danmark og fleiri íslendskar bólkar. Til dømis Náttúra. Teir í Náttúru lótu seg bergtaka av musikkinum, sum varð spældur í diskotekklubbanum, ikki minst Deep Purple og so tí amerikanska gittaristinum og sangaranum Leslie West. Musikalst var diskotekklubbin heldur framman fyri tey útlendsku diskotekini, tí var tað so spennandi hjá útlendingum og okkum sjálvum at fara í diskotekklubban í Havnar Klubba við trolinum uppi undir loftinum, superanleggum og go go-gentum.

## Aftur í trýssini

Hví? Jú, tað er tí, at trýssaramusikkurin var léttur, óbindandi og lívsjáttandi. Tí fara tey tilkomnu aftur í trýssini at hoyra og dansa eftir teimum ótaldu hitløgunum frá teirri tíðini. Superbólkarnir undantiknir, so var trýssaramusikkurin léttur og glaður. Hesin musikkur er klassiskur nú. Tey ungu vita ikki – og hví skulu tey eisini tað – at eitt nútíðar band fyri og annað eftir hevur tikið trýssaraløg til sín. Gamaní ljóðar tað betur enn tá, takkað veri teknikkinum. Men bara í heilt fáum førum lukkast tað teimum nýggju at fáa tann anda og tær kenslur í trýssaramusikkin.

Tað ger heldur einki.

Men tey ungu nú á døgum skulu bara minnast til, at trýssaramusikkurin var, er og verður livandi. Og tíbetur fæst hann allur sum hann er á elskaðum savnsfløgum.

Um vit vilja ella ei. Vit fara øll aftur í trýssini.



**Umsókn frá Nordisk Kunstforbund er aftur havnað um at seta á stovn eina virðisløn fyri myndlistfólk**

# Rákið ikki fyri myndlistini

MYNDLIST
*Turið Kjølbro*

Á sama hátt, sum rithøvundar, skøld, filmsfólk, arkitektar og onnur listafólk í Norðurlondum á hvørjum ári, hava møguleika at fáa stóru virðislønina, sum Norðurlandaráðið letur, hevur Nordisk Kunstforbund í hyggju at stovna eina serstaka virðisløn til myndlistafólk. Felagsskapurin hevur arbeitt við málinum í fleiri ár, men enn hevur Norðurlendska Ráðharraráðið ikki mett, at myndlistafólk eiga at fáa hendan heiðurin.

Nordisk Kunstforbund ætlar, at virðislønin verður á hædd við Norðurlendsku Bókmentavirðislønina á uml. 300.000 krónur. Til tess krevst játtan, sum er tvær-tríggjar ferðir upphæddina, sum sjálv virðislønin er, men higartil hava Norðurlendska Ráðharraráðið, Nordisk Kulturfond og aðrir grunnar víst uppskotinum aftur.

– Serliga tey stóru londini vísa tankanum aftur, meðan tey smærru eru fyri virðislønini. Eg vil kortini meta, at tað bert er spurningur um tíð, til ein slík virðisløn kemur, sigur Tróndur Patursson, sum er formaður í Nordisk Kunstforbund.

Undanfarni formansskapurin í Nordisk Kunstforbund hevur reist spurningin, hesin hevur eisini við Tróndi Paturssyni á odda, og komandi formansskapur fær álagt at arbeiða víðari við málinum at stovna eina virðisløn fyri myndlistafólk.

Hví áhugi ikki er í Norðurlendska Ráðharraráðnum at seta eina virðisløn fyri myndlistafólk á stovn, er ikki til at skilja, heldur formaðurin í Nordisk Kunstforbund.

– Undanførslan hjá Nordisk Kulturfond er, at áhugin fyri hinum virðislønunum verður minni, og tá grunnurin hevur sýtt eini umsókn um at seta á stovn eina barnamentanarvirðisløn, má hendan eisini sýtast. Vit meta hinvegin, at myndlistafólk eiga líka góðan rætt sum onnur listafólk at fáa eina stóra virðisløn. Hon nýtist ikki at verða latin á hvørjum ári, kanska annað ella triðja hvørt ár, sigur Tróndur Patursson.

Nevndir og rák skifta í øllum norðurlendskum samstarvi. Tróndur Patursson heldur ikki, at rákið júst er fyri tí norðurlendska í løtuni.

– Hóast tað eitur Nordisk Kulturfond er rákið ikki fyri norðurlendskum. Heldur er tað fyri, at norðurlendsk list skal vísast úti í heimi. Har verður eisini mett, at Bókmentavirðisløn og Filmsvirðisløn Norðurlandaráðsins geva ov lítið av sær. Tað er mest sum bara eitt sindur av umrøðu, og hon er eisini ov lítil, halda tey. Tey gloyma, at fyri listafólkið, sum fær virðislønina, hevur tað ómetaliga stóran týdning, at viðkomandi kann seta tíð og orku av burtur av til sítt arbeiði, sigur Tróndur Paturson.



– Tað er bert spurningur um tíð, til ein virðisløn fyri myndalistafólk kemur, sigur Tróndur Patursson, sum er formaður í Nordisk Kunstforbund

Mynd: Jens Kr. Vang

**MENTUNARPOLITIKKUR. Hyggja vit at øllum heiminum, eru tvey sløg av mentanum, sum burturav sameina fólkið. Tað eru fótbóltsvallirnir og biografløriftið. Her er fólksliga mentanin, sigur Birgir Kruse í sambandi við, at danski filmurin »Mirakel« vinnur fremstu virðisløn í Kanada**

# Kraftaverk í Kanada

FILMUR
*Birgir Kruse*

Í síðstu viku var barnafilmsstevna í Montreal í Kanada. Og eingin stevna uttan virðisløn. Tá stevnan varð lokin kundi liðið aftanfyri danska filmin »Mirakel« leggja fremstu virðislønina í kuffertið. Grand de Montréal eitur hon, kanadiska virðislønin.

Eins og Danmark hevur Kanada leingi havt áhuga fyri barnafilmi. Skapt grundarlag fyri framleiðslu og útbreiðslu. Og sjálvi hava bæði londini meiri enn so vunnið altjóða viðurkenning á økinum.

Danski filmurin »Mirakel« er fyrsti filmur, sum Natasha Arthy stjórnar. Søguna eigur Kim Fupz Aakeson og filmsfelagið Nimbus Film hevur staðið fyri kraftagerðunum, sum eru fyri alt húskið. Umframt fremstu virðislønina, vann filmurin eisini virðisløn fyri bestu søgu og harafturat kanadisku sjónvarpsvirðislønina.

Filmurin um kraftagerðirnar hevur lokkað fleiri enn 100.000 danir í biograf. Tað er tó ikki hin mest áhugaverdi danski filmurin í løtuni. Higartil í ár eru ikki færri enn 1,1 millión atgongurmerki seld til danskar filmar í donskum biohallum. Fremstur í røðini er »Italiensk for begyndere«, sum 743.000 danir hava sæð síðani hann varð frumsýndur hin 8. desember. Alt árið í fjør vórðu loyst tilsamans 2,05 milliónir atgongumerki til danskar filmar.

Í mong ár hevur verið hjúklað um film í norðurlendsku grannalondum okkara. Í Danmark hava tey roynt ymsar mátar at samantvinna skúla og biografar. Serliga á bygd hevur hetta hepnast væl. Í Svøríki hava tey tikið filmin í so stórum álvara, at tey hava sett nevnd, sum í 1988 lat frá sær eitt álit, sum longu í heitinum staðfestir eina mentunarpolitiska ábyrgd: »Statens ansvar för visning och spridning av värdefull film«. Stigtakari til hetta álit var eingin annar enn fyrrverandi mentamálaráðharri og stýrisnevndarformaður Bengt Göransson, sum hóskvøldið helt fyrilestur í Norðurlandahúsinum.



Thomas Bo Larsen tryggjar kraftagerðirnar í danska filminum »Mirakel«. Hann er eingil í søguni hjá Kim Fupz Aakeson, sum Nasha Arthy stjórnar

Her í landinum hava vit ikki eitt sovorðið mentunarsýni. Heldur síggja vit til, at sjónvarpið við almennum stuðli sendir okkum ókeypis film í hvørja stovu. Tað er einki galið við tí. Men tá vit samstundis ikki stuðla húkandi handilsligu biografvinnuni í landinum, men tvørturímóti leggja hann undir eftirlit, kenst mentunarsýnið margháttligt. Her mangla kraftagerðir, ið kunnu skapa fatan fyri, at hesir báðir biografar vit enn eiga – Havnar Bio og Suðuroyar Bio – eisini eru mentadeplar. Hyggja vit at øllum heiminum, eru tvey sløg av mentanum, sum burturav sameina fólkið. Tað eru fótbóltsvallirnir og biografløriftið. Her er fólksliga mentanin. So í framhaldi av Gunnar'sa frálíka setningi um »ein pott til mentanina fyri hvørja tunnuna« vil eg siga, »ein film fyri hvønn dystin – minst«.